# Heimsmet í at renna flest marathon!

TÍÐINDASKRIV
*Tórshavn Marathon*

Fleiri áhugaverdir útlendingar luttaka í Tórshavn Marathon leygardagin tann 17. juli, m.a. ein týskari í hevur heimsmet í at renna flest marathon, ein frá Kanada ið hevur runnið á øllum 7 kontinentum og í 92 londum, og ein donsk kvinna sum rann sítt marathon nr. 100 í Keypmannahavn í mai.

Leygardagin tann 17. juli verður Tórshavn Marathon fyri aðru ferð. Fyrsta royndin í fjør summar hepnaðist sera væl og bert smávegis tillagingar eru gjørdar í skránni. Luttakarar koma úr øllum norðurlondum, Týsklandi, Onglandi og Kanada og væntandi koma enn fleiri innan tilmeldingarfreistin er úti. Fyrispurningarnir hava verið nógvir og úr nógvum fjarskotnum londum, so væntandi fara vit at síggja nógvar fremmandar luttakarar komandi árini.

Luttakarin úr Týsklandi, Horst Preisler, sum nú er 69 ára gamal fer at renna sítt marathon nr. 1275 tann 17. juli og er hann tann einasti, sum enn hevur runnið meira enn túsund marathon og ultra marathon, t.v.s. at hann í nógvum førum eisini hevur runnið teinar sum eru meira enn 100 km.

Úr Danmark luttekur Birtta Houmann Sørensen



*Britta Houmann Sørensen*

sum er fyrsta danska kvinna ið hevur runnið 100 marathon. Hon hevur runnið 23 marathon skjótari enn 3 tímar, vunnið nógvar danskar kappingar og hevur runnið marathon í tíðini 2 tímar og 48 min. Tíðin í hennara marathon nr. 100 varð 3 tímar og 41 min.

Nógvir føroyingar teljast eisini millum marathon luttakararnar, m.a. Cecil Weihe sum vann kappingina í fjør. Spennandi verður at vita um hann aftur í ár setur met á rutuni og møguliga vinnur kappingina.

Áhugin fyri stuttleikarenningini er eisini stórur og væntandi verður tað ein stór fjøld av børnum og vaksnum sum fara at royna seg í ávikavist 3 km og 5,8 km teinunum. Ymisk tiltøk verða í gongugøtuni fyri



*Cecil Weihe sum vann í 2003*

áskoðarum og beinleiðis samband verður við hjálparfólk frá Bjargingarfelagnum sum kunnu boða frá hvussu gongst úti á rutuni, millum Kaldbak og Gongugøtuna.

Seinasti møguleiki at melda til stuttleikarenning ella marathon verður í Ítrótttarhøllini á Hálsi fríggjakvøldið tann 16. juli har allir luttakarar eisini kunnu styrkja seg til túrin við pasta. Innan hesa freist verður melda til online á www.torshavnmarathon.com






# Trygg á leiðini

Lívið er ljóst og vakurt. Brádliga hendir tað, og alt broytist.

Onki er so virðismikið sum lívið og ein góð heilsa. Tryggingin tekur hond um tað dýrabarasta vit eiga.

Hjá børnum fevnir tryggingin eisini um ymiskar barnasjúkur.

Tú kanst tryggja teg alt samdøgrið ella í frítíðini.

Tryggingin kann nýtast aðrastaðni enn í Føroyum. Tú kanst fara út í allan heim við henni.

Velur tú eina vanlukkutrygging, kunnu vit hjálpa tær fíggjarliga. Tryggingin er eitt trygdarnet fyri teg og alla familjuna, og ein íløga í framtíðina.

Ring til okkara á tel 345600 ella far inn á www.trygging.fo og fá nærri at vita, hvussu vit kunnu hjálpa tær.

Teknar tú eina Vanlukkutrygging í juli, fært tú
50%
í avsláttri av gjaldinum fyrsta árið

www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari


## Amnesty við á G! festivalinum

TÍÐINDASKRIV

Nú er seinasta umfar av spurnarkappingini hjá Amnesty liðugt.

Vinnararnir av fimta umfari eru:

Súsanna Jacobsen, 460 Norðskáli - Hjálmur frá Aprilla, virðið 1.000 kr.

Eivind Johan Tauser, Blankagøta 7, Tórshavn - Sodavatn frá Føroya Bjór

Johnny Lamhauge, Grannatún 11, Saltangará - Gávupakka frá Landshandlinum

Røttu svarini uppá spurningarnar í fimta umfari eru:

1. Hvussu eitur fløgan, sum Amnesty gav út í 1991?

Svar: Amnesty Tónar

2. Hvussu nógvar kvinnur og børn hava gist á Kreppumiðstøðini síðani 1990?

Svar: 206 kvinnur og 197 børn

3. Hvaðani er Antoinette Chahin?

Svar: Libanon

4. Hvør er altjóða aðalskrivari hjá Amnesty International?

Svar: Irene Khan

Og so er tað høvuðsvinningurin: Pocket Loox teldan frá formula.fo

Hepni vinnarin er Inger Jacobsen, Kristiansand, Norra

Vit ynskja henni hjartaliga tillukku! Eisini takka vit øllum sum hava luttikið.

Amnesty fer í summar at skipa fyri fleiri tiltøkum.

Vit fara at hava ein bás á G! festivalinum 16. og 17. juli. Har fara vit at selja Amnesty vørur og hava ymiskt kunningartilfar um Amnesty og sakir vit arbeiða við.

30. juli kl 16. fara vit væntandi at hava fótbóltsdyst aftur í Gundadali. Leikararnir verða løgtingslimir, samgonga móti andstøðu. Peningurin, sum kemur inn fer til Amnesty arbeiðið.

## Eimskip hækkar tænastustøðið á flutningi millum Føroyar og Bretland

TÍÐINDASKRIV

Eimskip byrjaði hesa vikuna nýggja rutu millum Føroyar og Bretland. Siglt verður beinleiðis úr Føroyum til Grimsby og aftur til Føroya. Talan er um eina rutu, sum økir tænastustøði innan bæði út- og innflutning munandi. Fyri útflutning ber til at røkka Bretland og Norðurfrakland til sølu mánamorgun, og fyri innflutning er hetta ein øktur møguleiki fyri innkeypi beinleiðis úr Bretlandi.

Í Føroyum verður siglt av Klaksvík, av Toftum og av Tvøroyri. Klaksvík er fyrsta havnin, hagan siglt verður mikukvøld. Av Toftum verður siglt seint seinnapart hósdag, og av Tvøroyri verður siglt hóskvøld.

Við at sigla beinleiðis upp Grimsby, sum er í Humberumránum, kemur vøran inn í hjarta á Bretska marknaðinum. Hetta bæði um talan er um vøru til detailliðið ella ídnað .

Skipið, siglt verður viðð er Gullholm. Skipið er plattaskip og fermur gott 1.000 plattarí 6 køli- og frystilastum.



Landsstýrismaðurin um viðgerðarstovnarnar:

# Virksemið skal lýsast betur

**– Vit hava sett fram krav um, at virksemið á Heilbrigdinum og Blákrossheiminum, sum landið veitir fíggjarligan stuðul til, verður lýst betur, sigur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna-og heilsumálum. Men hann leggur dent á, at hetta ikki er komið í kjalarvørrinum av málinum um unga drongin, sum lat lív á Heilbrigdinum í 1997**

ALMANNAMÁL
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, sigur, at stýrið fer at krevja at virksemi, sum almennir pengar fíggja á viðgerðarstovnunum, verður lýst betur*

*Savnsmynd*

Fyri hálvum øðrum mánaði síðani ella so vóru fólk frá almanna- og heilsumálastýrinum á vitjan á Heilbrigdinum, har endamálið var at fáa eina kunning um virksemið, sum fer fram á stovninum. Ætlanin er somuleiðis at vitja hin stovnin við sama endamáli.

– Hetta er nakað, sum vit hava arbeitt og kjakast um í longri tíð, og vil eg undirstrika, at onki av hesum er íkomið av málinum um sorgarleikin á Heilbrigdinum í 1997, sigur landsstýrismaðurin.

Ákoyringar hava verið frammi fyrr um, at viðgerðarstovnarnir eiga at vera beinleiðis undir heilsuverkinum, men tað hevur ongantíð vunnið politiskan frama. Og tað hevur landsstýrismaðurin heldur ongar ætlanir um at fara í holt við, sum nú er.

Báðir viðgerðarstovnarnir fáa eina stuðulsjáttan, sum er á fíggjarlógini, men eru teir sjálvstøðugir stovnar, har nevnd ella stýri og leiðsla vara av stovnunum og øllum viðurskiftunum á teimum.

– So longi sum stovnarnir eru stýrdir av nevnd ella stýri, eru tað tey, sum hava ábyrgd av virkseminum og eftirlitinum, staðfestir hann.

### Avrúsingarspurningur

Innan fyri hetta økið av viðgerð er avrúsingin tann dýrasti parturin, og tískil kundi tað verið áhugavert at sett fram spurningin um, ikki avrúsingin átti at verið avmarkað meira enn hon er í dag.

Sum støðan er í dag, fer avrúsing fram á báðum stovnunum, og til samanberingar kann sigast, at í til dømis Malmø við 500.000 íbúgvum, fer øll avrúsing fram á sjúkrahúsunum, meðan eftirviðgerðin fer fram á stovnum.

Hans Pauli sigur, at hetta hevur verið frammi í kjakinum, men tað er onki, sum bendir á, at hetta verður ført út í lívið, sum nú er.

– Hatta er ein áhugaverdur spurningur, og vit hava leystliga havt tað á orði, men longur er tað ikki komið. Hatta er sostatt ikki aktuelt í løtuni, sigur hann. Hans Pauli vísir á, at í viðgerð fyri misnýtslu eru fleiri viðgerðarhættir. Sum til dømis avrúsing, eftirviðgerð og familjuterapi.

– Tá vit vitjaðu Heilbrigdið, varð ynski sett fram um, at hava familjuterapi eisini, so her eru fleiri viðurskifti, sum eiga at verða tikin upp til kjak, heldur landsstýrismaðurin.

### Frætta niðurstøðu

Í sambandi við málið um unga drongin, sum lat lív, segði Jákup Lindenskov, formaður í nevndini fyri Heilbrigdinum, við Útvarp Føroya, at nevndin fer at hava ein fund, har tað skal tosast um hetta málið.

Hans Pauli sigur, at tey hava heitt á stýrið um at lata frætta frá sær, tá fundurin hevur verið.

Hann leggur at enda afturat, at við at lýsa virksemið betur, so kundi hann hugsað sær, at tað komu nøkur hagtøl á borðið eisini.

– Ikki nakað persónsmál, men nøkur tøl, har tað ber til at síggja, hvussu nógvar viðgerðir hava eydnast væl og so framvegis. Men eg má undirstrika enn einaferð, at alt hetta, sum vit hava tosað um, hevur verið uppi til kjak longi, og tískil kemur tað ikki í kjalarvørrinum av sorgarleikinum í 1997, sigur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, at enda.





0,- kr/mb

frá kl. 24-08 allan juli

Allan juli mánað kunnu allir privat I-net breiðbandkundar hjá okkum sverma og downloada og fyri okkara skuld ríða og rógva so langt teimum lystir ókeypis á alnetinum millum midnátt og 8 á morgni..!

*Góða nátt...*

I-net BREIÐBAND

**Um tú ikki longu hevur I-Net Breiðband so ring 808080, vitja www.tele.fo ella eina telebúð og fá I·net Breiðband til júst tín tørv...**

FØROYA TELE

*Tilboðið er treytað av at tú hevur I·net breiðbandhald frá Føroya Tele. Tilboðið er galdandi frá 1 . juli til og við 31. juli 2004.*

petur & petur • 320870